*Thyge Lehmann um marknaðartrætuna:*

# Fjølmiðlar! Gevist við gitingum

*–Gitingar um hvat næsta útspælið verður hjá føroysk/donsku sendinevndini í marknaðarsamráðingunum við Bretland kann bert skaða føroysk áhugamál*

Formaðurin fyri føroysk-/donsku sendinevndini, Thyge Lehmann, danskur sendiharri í London, heldur ikki tað verða rætt, at føroysku fjølmiðlarnir gita um hvørji tey næstu útspælini verða hjá nevndini í samráðingunum við bretar.

–Hetta kann bert tæna bretum, at føroysku fjølmiðlarnir seta spekulatiónir í gongd. Eg vil tí heita á føroysku pressuna um ikki at blása samráðingarnar ov nógv upp, sigur Thyge Lehmann.

–Tit skulu minnast til, at bretar fylgja ógvuliga neyvt við, hvat kemur fram í føroysku fjølmiðlunum og tað er óheppið at ov nógv lekur út mitt í eini samráðingarstøðu, sigur Thyge Lehmann við Tíðindablaðið Sosialin.

Marita Petersen, løgmaður og Jógvan Sundstein, varaløgmaður fóru klokkan seks í gjárkvøldið á fund við danska uttanríkisráðið um ein sermerkt føroysk nevnd skuldi fáa heimild at samráðast við bretar.

Marknaðarmál eru ríkismál og tí er um føroyingar hava heimild at samráðast einsamallir um mark við bretar

Thyge Lehmann hevur bjóðað seg til at taka seg aftur sum formann í sendinevndini. Hví hann hevur gjørt tað hevur okkum eydnast at fáa uppspurt, men kanska kemur meir fram aftan á fundin millum føroyingar og uttanríkisráðið.

**justinus**


Hoyr og síggj



BILLY GRAHAM
18.-21. mars 1993

Norðuroyggjar:
Í Betesda og Soli Deo Gloria í Klaksvík

Streymoy:
Í Ebenezer og Gundadalshøllini í Tórshavn

Eysturoy:
Í Ítróttarhøllini í Runavík

Suðuroy:
Í skúlanum í Porkeri

kl. 20
Hóskvøldið
Friggjakvøldið
Leygarkvøldið
Sunnukvøldið

Fundirnir verða sjónvarpaðir úr Týsklandi og vístir á stórskíggja



Gevið børnunum HJÁLM!



Børn duga ikki so væl at taka hendurnar fyri seg, detta tey á súkklu.

VERJIÐ HØVDIÐ!



Visti tú...
...at SMS FOTO hevur eina
Canon
lit-kopimaskinu, sum m.a. kann: »kroysta« myndir, so at motivið antin verður breitt ella smalt??
SMS FOTO
Tlf. 19820



SUCCES TILBOÐ
STOKT LUNDABRINGA
V/ BRÚNKAÐUM EPLUM WALDORFS SALATI OG SÓS
145,-
Reinsdjórakjøt
v/ brúnkaðum eplum og waldorfs salati
RIO BRAVO RESTAURANT
Kongagøta 10 Tórshavn



Manning



Hervið verður søkt eftir manning til **M/F. NORRØNU** til **summarsiglingina 1993.**

Størvini, ið sett verða, umfata allar deildir innan catering, so sum

kokkar, bakarar, sleiparar, barrfólk, cafeteriafólk, tænarar, kioskgentur, koytugentur, informatiónsgentur og hjálparfólk.

Skrivlig umsókn verður at senda til

**P/F. SMYRIL LINE**
Postboks 370
FR-110 Tórshavn